FCK-bragd og Brøndby-sensatión:

# Danir gjørdu bart

*FC Keypmannahavn – uttan Toda Jónsson – og Brøndby stóðu fyri óvæntaðum úrslitum í europeisku fótbóltskappingini hóskvøldið*



**FC Keypmannahavn vann á útivølli móti Ajax Amsterdam, meðan Brøndby spældi sítt kroatiska mótstøðulið niður í UEFA Cup kappingini hóskvøldið**

FÓTBÓLTUR

Danir vóru helst teir, sum vóru mest ovfarnir av úrslitunum hjá teimum báðu stóru feløgunum hjá sær hóskvøldið.

FC Keypmannahavn og Brøndby spældu seinnu dystir sínar í Europa Cup kappingini, og eftir at hvørki av liðunum kláraði at vinna á heimavølli, roknaðu tey flestu við, at feløgini fóru at verða send úr kappingini í seinna dystin.

Mótstøðan hjá bæði FCK og Brøndby var sterk. FCK skuldi spæla móti stórfelagnum Ajax Amsterdam, meðan Brøndby skuldi hitta liðið, sum sendi enska toppliðið Aston Villa úr kappingini, Varteks.

## Ajax sett upp á pláss

FC Keypmannahavn spældi málleysan javnleik í fyrra dystinum á heimavølli, og tí varð roknað við, at Ajax fór at gera tað, sum var neyðugt fyri at koma víðari.

Men soleiðis skuldi tað ikki ganga.

FC Keypmannahavn var í stórum pørtum av dystinum við yvirlutan í leiki, og kjansir vóru eisini at gera mál. Zuma hevði góðan møguleika beinanvegin í dystin, men hann skjeyt á málverjan.

Eftir hálvleikssteðgin legði Ajax harðliga fyri, og teir trýstu FCK í einar 10 minuttir. Men so vendi FCK dystinum, tók alt meira yvir, og fluttu bóltin væl á vøllinum.

Dysturin gekk móti longdari leiktíð, tá avgerðin fall. Átta minuttir fyri tíð fekk FCK fríspark einar 20 metrar úr málinum, og tað tók Niclas Jensen sær av. Hann sendi bóltin fram við múrinum og upp í málhorni.

Seinastu minuttirnar trýsti Ajax, og teir fingu ein góðan møguleika, men tað nógv útskeldaði FCK-málverjin, Magnus Kihlsted, bjargaði væl.

Í evstu løtu hevði FCK stóran møguleika, men Zuma brendi aftur. 1-0 var nóg mikið hjá FCK, sum nú er komið víðari í UEFA kappingini.

Todi Jónsson stríðist við skaða, og hann var tí ikki við á liðnum hjá FCK hetta kvøldið.

## Brøndby brillieraðu

Brøndby stóð fyri eini veruligari sensatión hóskvøldið. Teir høvdu tapt 3-1 á heimavølli móti kroatiska liðnum Vartaks, og tað var einki, sum bendi á, at danska oddaliðið skuldi klára at venda hesum tapi í seinna dystinm.

Men Brøndby legði harðliga fyri, teir vóru ágangandi um allan vøllin, og vístu slíkan hugburð, sum tað sjáldan sæst hjá donskum liðum.

Longu eftir 40 sekund gjørdi Vartaks sjálvamál, og so fór Brøndby-maskinan rættiliga í gongd.

Brøndby skuldi vinna 2-0 fyri at koma víðari, og tá ein hálvur tími var farin, skoraði Peter Madsen til 2-0. Nakrar minuttir eftir steðgin økti svenski profilurin hetta kvøldið, Matias Jonson, til 3-0, og hann fekk ikki afturhald. Hann skoraði tvey mál afturat, so Brøndby vann ein lemjandi 5-0 sigur.

Mótstøðuliðið hjá Brøndby var ikki eitthvørt, tí teir sendu fyri kortum enska toppliðið Aston Villa úr UEFA kappingini. Nú verða teir sjálvur ekspederaðir fyri full drøn.

# Neistin tveir høvuðsstuðlar

**Smyril Line og Statoil hava gjørt stuðulsavtalur við Neistan**

HONDBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*



*Smyril Line og Neistin hava gjørt stuðulsavtalu, sum umfatar besta kvinnuliðið hjá felagnum*

Smyril Line verður høvuðsstuðul hjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum í vetur, og hjá monnunum fer Statoil at prýða troyggjurnar.

Smyril Line og Neistin undirskrivaðu í vikuni ein eitt ára sáttmála, og hendan sáttmála er formaðurin í Neistanum, Dánjal Pauli Mohr, ógvuliga fegin um. Hann sigur, at avtalan er góður styrkur hjá felagnum.

Neistin og Smyril Line hava í fleiri ár havt tætt samstarv, tí Neistin hevur síðani 1994 annað hvørt ár sent 100 hondbóltsspælarar við Norrønu av landinum til kappingar.

Tá tað ræður um besta mansliðið hjá Neistanum, hevur felagið gjørt avtalu við oljufelagið Statoil, sum verður høvuðsstuðul.

Statoil vil hava sítt navn á sjónligum staðið, og tað heldur felagið, at Neistin kann syrgja fyri.



*Statoil skal í vetur prýða troyggjurnar hjá mansliðnum há Neistanum. Avtala er gjørd um hetta*

## Hondbóltsstøður

**Støðan 1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 118 | 82 | 36 | 8 |
| 2 | Neistin | 4 | 4 - 0 - 0 | 108 | 98 | 10 | 8 |
| 3 | H71 | 5 | 3 - 0 - 2 | 132 | 132 | 0 | 6 |
| 4 | StÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 105 | 105 | 0 | 4 |
| 5 | Kyndil | 5 | 1 - 0 - 4 | 117 | 130 | -13 | 2 |
| 6 | KÍF | 4 | 1 - 0 - 3 | 98 | 115 | -17 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 4 | 0 - 0 - 4 | 90 | 106 | -16 | 0 |

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 - 0 - 0 | 119 | 79 | 40 | 8 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 106 | 77 | 29 | 6 |
| 3 | Stjørnan | 4 | 3 - 0 - 1 | 115 | 93 | 22 | 6 |
| 4 | VB | 4 | 3 - 0 - 1 | 101 | 88 | 13 | 6 |
| 5 | Sóljan | 5 | 1 - 0 - 4 | 111 | 130 | -19 | 2 |
| 6 | Kyndil | 5 | 1 - 0 - 4 | 116 | 147 | -31 | 2 |
| 7 | StÍF | 4 | 0 - 0 - 4 | 69 | 123 | -54 | 0 |

**Dystir hetta vikuskiftið**

**Leygardagur 03/11**

| | |
|---|---|
| 14.30 Kyndil Ikv - StÍF Ikv | A Hjalmar/Kristian |
| 16.00 Kyndil Im - StÍF Im | A Hjalmar/Kristian |
| 15.00 Stjørnan Ikv– VB Ikv | C Kári/Trúgvi |

**Sunnudagur 04/11**

| | |
|---|---|
| 16.00 Tjaldur Im – KÌF Im | A Hjalmar/Kristian |
| 14.30 Neistin Ikv – VIF Ikv | B Hannis/Uni |
| 16.00 Neistin Im – VÍF Im | B Hannis/Uni |



VIÐMERKINGAR

# Yvirtøkan av Skipaeftirlitinum

*Torleivur Hoydal*
*Skipaeftirlitsmaður*

Eg haldi at viðgerðin í miðlunum í samband við yvirtøkuna av skipaeftirlitinum, krevur at fáa fleiri ítøkiligar upplýsingar á borðið.

Hvørt ein er fyri ella ímóti avgerðini hjá landsstýrismanninum at flyta Skipaeftirlit Føroya til Vágarnar, so má tað takast til eftirtektar, men nógv talar fyri at bíða til undirsjóartunnilin er liðugur.

Eftirlitið á føroyskt skrásettum skipum hevur tey seinastu árini verið undir stórari broytan. Áðrenn 1988 varð eftirlitsarbeiðið skipað og útinnt av eftirlitsfólkið í Føroyum. Hettar eftirlitið umfataði verðandi skip, innkeypt skip og nýbygningar, bæði heima og uttanlanda og góðkenningin av tekningum varð í stóran mun gjørd í Danmark. Um neyðugt fekst hjálp frá eftirlitsfólki úr Danmark at avloysa í Føroyum og sýna nýbygningar í útlondunum.

Síðan 1988 eru arbeiðsuppgávurnar so líðandi fluttar úr Føroyum til Danmarkar, samstundis sum arbeiðsmegin er minkað. Í juni 1998 varð økisdeildin við leiðslu í Føroyum niðurløgd og hevur deildin í Føroyum síðani verið partur av deildini sum umfatar Sæland. Leiðarin fyri deildina í Føroyum situr í dag í Svendborg.

Yvirtøkan varð so endaliga staðfest tann 30. oktober við avtaluni millum Føroya Landsstýri og Erhversministerii.

Tann 1. januar komandi verður skipaeftirlitið føroyskt við nýggjum leiðara og sambært landsstýrismannin í nýggjum hølum vesturi í Vágunum.

Ábyrdin fyri arbeiðsuppgávurnar, ið tey seinastu árini eru fluttar úr Føroyum, verður nú flutt heimaftur.

Nýggj lóggáva við heitinum »Lóg um trygd á sjónum« verður væntandi endaliga viðtikin í løgtinginum í ár.

Eitt eftirlitsfólk afturat verður sett í starv og kann í fyrta lagi væntast at verða liðugt útbúgvið til uppgávuna áleið august mánaða 2002. Tá vera 3 eftirlitsfólk at taka sær av eftirlitsarbeiðinum.

Lógin um trygd á sjónum er grundað á millumlanda sáttmálar, sum Føroyar binda seg til at halda, og er á henda hátt grundarlag fyri at føroysk skrásett skip trygdarliga eru á sama høga støði, sum skipini skrásett í okkara grannalondum.

Vit skulu gera okkum greitt, at ásettu sýnsskeiðini skulu haldast og skipsskjølini áteknast til ásettu tíðir.

Frágreiðinginin um »yvirtøku av skipaeftirlitinum« er skrivað av serkønum og handað landsstýrismanninum í aug. 2000 .Í hesu frágreiðing verða ætlaðir 6000 sýnstímar árliga, íroknað 1500 tímar í ferðatíð. Hetta er grundað á ferðing úr Havnini út á bygd.

Fortreytirnar í frágreiðingini (aug. 2000) eru:

a) Skrivstovan liggur í Tórshavn.
b) 4. eftirlitsfólk á 1500 sýnstímar árliga.
c) Bygnaðurin í Skipaeftirlitið Føroya er komin upp á pláss.
d) Seinastu trý árini (1998, 1999 og 2000) hevur sýnstíðin í Havnini verið áleið 46% (t.v.s. áleið 3000 tímar árliga, samanborið við frágreiðingina).

Hin helvtin (áleið 3000 tímar) verða nýttir uttanfyri Havnina, í mestan mun í Eysturoynni, Norðoyggjum og Suðuroy, íroknað 1500 tímar til ferðing.

Fortreytirnar 1. januar 2002 og til undirsjóartunnulin opnar fyri ferðslu 2003:

a) Skrivstovan liggur í Vágunum.
b) 2 eftirlitsfólk tað fyrsta hálva árið og 3 eftirlitsfólk frá aug. 2002.
c) Arbeiðstíð skal nýtast at skipa bygnaðin í einum nýggjum og víðkaðum skipaeftirlitið.
d) Sýnstíðin í Havnini væntast at verða tann sama áleið 46%, men nú skal leggjast afturat ferðing úr Vágunum til Havnar og aftur til Vágarnar.

Hin helvtin av sýnstíðini verður væntandí nýtt sum higartil uttan fyri Havnina.
e) Írestandi sýnstímar mugu so fáast til keyps frá eftirlitsfólki úr Danmark.

## Mín niðurstøða

Skilabest hevði verið at bíða at flutt skrivstovuna til Vágarnar tá undirsjóartunnilin er koyrandi ígjøgnum,

Hetta grundi eg á:

a) Spard verður munandi ferðatíð (Vit kenna tey flestu bíðirøðirnar í Vestmanna og Oyragjógv).
b) Hølir eru tøk í verðandi skrivstovu í Havnini, sum kann rúma øllum starvsfólkunum.
c) Spardar verða útreiðslur til gistingarhús fyri hjálparfólk úr Danmark tí íbúð er tøk í húsinum við J. Broncksgøtu.
d) Spardir ferðatímar kunnu nýtast til sýnstíð og at fáa bygnaðin upp á pláss.

Lat okkum prógva fyri okkum sjálvum og umheiminum, at vit eru før fyri at skipa ein nýggjan effektivan eftirlitsstovn sum skapar álit millum manna við atliti at trygdini á sjónum.

# Langtíðarætlan fyri bústaði

Katrin Dahl fyri Javnaðarflokkin hevur sett hetta uppskotið til samtyktar. Heitt verður á landsstýrið at fara undir at gera eina nøktandi langtíðarætlan fyri útvegan av bústaði til fólk við serligum tørvi.

## Viðmerkingar:

Tað er eingin áseting í føroyskari lóggávu, sum sigur, at tað almenna hevur skyldu at útvega íbúðir til borgarar landsins. Heldur ikki eru nakrar ásetingar, tá tað snýr seg um bústað til fólk, sum bera brek, sum siga, at tað almenna skal útvega ávísar bústaðarkarmar til hesi.

Tað nærmasta vit koma til eina skyldu hjá tí almenna at hjálpa teimum, sum hava hjálp fyri neyðini, er at finna í forsorgarlógini.

Í hesi lógini er sjálvt grundarlagið undir sosialpolitikkinum orðaður. Grein 32 sigur, at landsstýrið kann seta á stovn ella góðkenna serligar stovnar fyri fólk við serligum tørvi. Hetta merkir tó ikki, at landsstýrið skal gera tað.

10. apríl 2000 lat ein arbeiðsbólkur úr hondum álit, sum ber heitið: »Bústaðarviðurskifti hjá brekaðum í Føroyum ár 2000«. Í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri MBF, Javna, Serstovnadeildina, Føroya Pedagogfelag, Tórshavnar Kommunu og Klaksvíkar Kommunu Brekað fevnir í hesum álitinum um: menningartarnað, autistar, sálarliga sjúk, rørðslutarnað, ferðsluskadd og onnur, sum bera brek.

Hetta álitið hava allir tinglimir fingið, og lýsir tað støðuna umframt møguligar loysnir. Í álitinum eru eisini tørvslistar fyri alt landið, seinast dagførdir 2. apríl 2000. Hesar hava Almannastovan og Serstovnadeildin arbeitt við í trý ár. Málsviðgerðar á Almannastovuni hava skrásett øll viðskiftafólk við tørvi í eina felags uppskriving, tá tey meta, at hesi fyrr ella seinni fáa tørv á bú- og/ ella dagtilboði frá Serstovnadeildini. Serráðgevarar hjá Almannastovuni hava saman við Serstovnadeildini dagført listan og gjørt metingar um, nær hvør einstakur kann hugsast at fáa brúk fyri bú- og/ella dagtilboði.

Í álitinum verður tó sagt, at tað eru ikki øll fólk við serligum tørvi, sum eru í sambandi við málsviðgerðar á Almannastovuni, og tí kann tað hugsast, at tað eru fleiri, sum, hóast tey hava tørv, ikki hava gjørt Almannastovuna varuga við sín tørv.

Út frá uppgerðini koma tey fram til, at komandi 10 árini verður neyðugt at útvega umleið 80 búpláss. Bráðfangistørvurin er 17 og innanfyri tey næstu tvey árini eini 19 afturat. Tørvur er um alt landið, men mest átrokandi er hann í Suðurstreymoy og Norðuroyggjum.

Eyðvitað er, at ein raðfesting má gerast, so byrjað verður, har ringast stendur til. Men Javnaðarflokkurin heldur eisini tað vera neyðugt at gera eina langtíðar raðfesting, soleiðis at politiski myndugleikin setir sær nøkur mál, og soleiðis at vit kunnu vera trygg við, at tað er ein miðvísur politikkur á økinum.

Ymiskt er, hvat hvørjum tørvar, og tí er neyðugt at taka støði í hvørjum einstøkum og tillaga bústað, hjálp, stuðul, umsorgan og venjing eftir tí. Vísandi til gongdina í okkara grannalondum siga tey í álitinum, at: »tey brekaðu fara ikki longur at verða viðfarin sum ein bólkur, sum býr á stovni, men sum einstaklingar við ymsum krøvum og vónum til lívið«.

Við støði í frágreiðingini hjá Javna, sum spennir yvir 10 ár, er tilfar tøkt at arbeiða útfrá.

Javnaðarflokkurin heldur tað vera neyðugt at farið verður miðvíst og í felag undir at loysa ovurhonds stóru bústaðarneyðina, sum fólk við serligum tørvi eru í. Tá flokkurin leggur áherðslu á, at hetta verður gjørt í felag, er tað tí, at vit við uppskoti til samtyktar seta okkara vón til, at allir flokkar, skiftandi samgongur og landsstýrismenn eftir førimuni fara at inna hetta í verki.

# Flogferðslan økist

**Tíðindaskriv**

Flogferðslan um Vága Floghavn er framvegis í støðugum vøkstri.

Í november 2001 ferðaðust tilsamans 11.870 fólk um floghavnina. Hetta er ein øking uppá 11,7 % í mun til november í fjør, tá 10.629 fólk ferðaðust um floghavnina. Vøksturin stavar serliga frá teimum, ið ferðast til og frá Stórabretlandi, har vøksturin var 31,4% í mun til november í fjør. Á Danmarkar leiðunum er vøksturin 4,9%, meðan vøksturin er 8,8% á Íslands leiðunum.

Operatiónirnar, fráferðir og komur, hava í oktober 2001 verið 547 móti 389 í oktober í fjør, ella ein vøkstur svarandi til heili 40,6%. Rutuflúgvingin er økt við 12%, innanoyggja tyrluflúgvingin við 26%, meðan frálanda tyrluflúgving hevur verið 17,5% av teimum samlaðu fráferðum og komum. Millum Vága Floghavn og leitingarøkini í føroyskum sjógvi hava í november verið gjørdar 87 ferðir.

Higartil í ár hava ferðast 139.717 fólk um floghavnina. Hetta er ein vøkstur uppá 11,0% í mun til í fjør, tá 143.208 fólk ferðaðust um floghavnina.

Samlaða operatiónstalið er higartil í ár 5.033 móti 4.158. hetta svarar til ein vøkstur fyri 10 teir fyrstu mánaðarnar í ár uppá 21,1%.

Samlað sæð stavar ein stórur partur av vøkstrinum í operatións- og ferðafólkatalinum í ár frá frálandavirkseminum, ið hevur verið í ár. Hetta skeiði væntast at enda um einar 2-3 vikur.

Aðrar útgreiningar av hagtølunum kunnu finnast á heimasíðuna hjá Vága F l o g h a v n www.slv.dk/vagar